Høkjuli› hjá GÍ smurdi TB av

Gøtumenn vunnu stórt á TB, sjálvt um teir vóru illa manna›ir

Bólkur 3: Tveir spælarar vór›u vístir av vølli, og 8–1 sigurin ber bo› um, at tvørámenn eru alt anna› enn væl fyri

GÍ vann 8–1 í Sarpisger›i móti TB. Ta› kundi bo›a› frá, at nú er fótbóltsmaskinan hjá gøtumonnum væl trimma› og vi› at koma í tær snú›ningarnar, sum í níti árunum bar f‡ra meistaraskapir á ra› vi› sær.

Men sannleikin er ein annar. Hópurin, sum Johan Nielsen hevur at arbei›a vi›, er væl teprari, enn hann hevur veri› undan farin ár, og hesa fer› var hann noyddur at royna eina uppstilling, sum var púra ókend, og sum átti at bori› órógv vi› sær og harvi› møguleikar til mótstø›uli›i›.

Hans Jákup á Líknargøtu var vongverji í høgru. Hann hevur ongantí› á›ur spælt í 1. deild. Hallur Hansen var málverji. Hann hevur ongantí› á›ur vart máli› í bestu deildini.

Orsøkin til nógvu broytingarnar á GÍ li›num vóru, at fleiri av lyklaspælarunum sótu uttanfyri, tí teir vóru smáskaddir. Talan var um málverjan Sunvard Joensen og mi›vallararnar Magna Jarnskor og Súna Olsen.

Óli Hansen fekk rey›a korti›, tá Birgir Sondum fyri a›ru fer› vísti honum gula korti›.

Løtt mál

Tvørámenn manga›u fleiri av berandi kreftunum, og ta› tóktist raka uppaftur meinari hjá teimum, enn ta› gjørdi hjá mótstø›umonnunum. Talan var um málverjan Magna Hentze, aftasta mann Magna Petersen og so Jón Tór›ur Holm. Ta› var steinur omaná byr›u, at Tór›ur Mortensen sá rey›a korti›.

Gøtumenn fingu átta mál, og fleiri teirra vór›u skora› eftir innlegg úr sí›unum. Í Gøtu siga tey, at sjálvt um sigurin var stórur, so var fótbóltsspæli› lakari, enn ta› hevur veri› í flestu dystum, sí›ani GÍ kom í 1. deild fyri tjúgu árum sí›ani.

Helgi L. Petersen setti hol á eftir innlegg úr høgru frá Rúna Justinussen, sum hesa fer› var álopsma›ur. Rúni økti sjálvur til 2–0, Pauli Jarnskor skora›i til 3–0 upp á langskot, Hans Pauli Petersen var fyrstur á, eftir at Herman Albinus hev›i hálvbjarga› roynd frá Leivi Hansen, og Jóan Petur Olsen økti til 5–0 eftir horna.

Tá Teitur Rasmussen minka›i um munin til 5–1, var› Hallur Hansen sn‡ttur, tí bólturin tók í ein gøtumann. Helgi L. Petersen økti til 6–1, tá rangstø›ufella kiksa›i, Bartal Eliasen økti til 7–1 eftir dey›bóltsstø›u, og Rúni Justinussen slerdi sí›sta seymin í.

GÍ:
Hallur Hansen,
Hans Jákup á Líknargøtu,
Bartal Eliasen,
Áslakur R. Petersen,
Leivur Hansen,
Helgi L. Petersen,
Jóan Petur Olsen,
Pauli Jarnskor,
Rúni Justinussen,
Óli Hansen,
Hans Pauli Petersen.

TB:
Herman Albinus,
Teitur Rasmussen,
Tór›ur Mortensen,
André Dalfoss,
Andrass Nolsøe,
Jan Albinus,
Einar Petersen,
Vagnur Nolsøe,
Bár›ur Dimon,
Dan Mortensen,
Hallur Christiansen.

Nógvir møguleikar í Gundadali

Bólkur 3: HB tykist vera á rættari lei›, og avriki› hjá vágamonnum bo›a›i frá, at teir ætla sær ikki at flyta ni›ur

Av teimum ellivu HB monnunum, sum vóru á vøllinum frá fyrsta bríksli móti FS Vágum, vóru bara f‡ra fastir menn á li›num í fjør. Men avriki› bo›a›i frá, at gamli HB stílurin longu nú er meiri sjónskur, enn hann var í fjør.

Teir á heimali›num løgdu nógva orku í at var›veita bóltin og at brúka breiddina á vøllinum. Vi›hvørt eydna›ist ta›, og a›rar tí›ir eydna›ist hetta minni væl.

HB mynda›i eina rø› av vandamiklum stø›um frammanfyri málinum hjá FS Vágar. Stø›urnar stó›ust av gjøgnumbrotum í sí›unum og innleggum. Ta› gekk kortini strilti› at fáa mál. Hetta komst fyri ein part av, at Bár›ur Mortansson (hóast hann ikki er serliga stórur, so er hann sera vandamikin í høvu›sspælinum) var óheppin vi› fleiri stútarum, og fyri ein part av at litaviski málverjin hjá vágamonnum er so sera tryggur og harvi› álitisskapandi.

Málini

Ta› sást væl, at ta› darva›i HB spælararnar ikki so líti›, at teir ikki fingu mál burtur úr stóru leikligu yvirvágini.

Vágali›i› var ikki komi› í Gundadal at undirhalda. Teir hildu nógv fólk aftarlaga á vøllinum, me›an teir lúrdu eftir møguleikanum at fara í snarálop, og tá hálvur tími var farin, eydna›ist ta› teimum – kanska var ta› í fyrstu royndini móti málinum – at fáa mál. Mi›vallarin Hannus Olsen lyfti frísspark úr vinstru í brotsteigin, Hallur Danielsen stúta›i yvir í hitt bor›i›, har ein av ungu vágamonnunum, Tór–Ingar Akselsen, lyfti inn fyri aftur, og eftir eitt sindur av aftur og fram høgdi toppskjúttin í 2. deild í fjør, Birgir Joensen, bóltin í máli›.

Máli› var hvøkkur fyri HB, og fyri teir var ta› sera t‡dningarmiki›, at vágamenn gloymdu at fáa armarnar ni›ur aftur. Í minuttinum eftir fyrsta máli› javna›i HB. Vágaverjan var óansin, tá Símun Eliasen leg›i innfyri úr vinstru, og millum tríggjar mótstø›umenn tveitti Bár›ur Mortansson seg fram og stúta›i í kassan.

Møguleikar vóru bá›ar vegir. Kanska hev›i eitt úrslit sum t.d. 7–3 til heimali›i› ikki veri› av lei›, men ta› kom bara eitt mál afturat. Ta› skora›i Símun Eliasen, tá ta› resta›i eitt korter, og talan var um eitt gott mál. Mi›vallarin í vinstru fekk bóltin frammanfyri mistrikuna, sneiddi tveir menn av sær og smekka›i upp í sí›uneti› úr fimtan metra fjarstø›u.

Fleiri ska›ar

Hjá HB er ta› sjálvandi eitt sindur ørkymlandi, at fyrsti málverji, Bár›ur Johannesen framvegis er skaddur. Danny Rasmussen fær royndir vi› at spæla í steypakappingini, men ta› ver›ur ivaleyst eitt afturstig, um Bár›ur Johannesen ikki ver›ur tøkur, tá ta› ver›ur fari› undir landskappingina.

Hjá vágamonnum var ta› stórur smeitur í 2. hálvleiki, tá stinni verjugeneralurin, Darius, noyddist at taka seg av vøllinum. Birgir Joensen noyddist at fara út í 2. hálvleiki, og tá mi›vallarin, Bakus, ikki var vi›, tí hann var skaddur í fótinum, sigur ta› seg sjálvt, at ta› sást væl aftur.

HB:
Danny Rasmussen,
Jóhannis Joensen,
Hans á Lag,
Florin Miháescu,
Janus M. Joensen,
Hallur Danielsen,
Rúni Nolsøe,
Gheorge Ciurea,
Símun Eliasen,
Jón Rói Jacobsen,
Bár›ur Kortansson.

FS Vágar:
Remi Migisionis,
He›in Joensen,
Darius Magdisauskas,
Zilvanius Zudys,
Jack Johansen,
Sonni Johansen,
Hannus Olsen,
Albert Ari Thomassen,
Tór–Ingar Akselsen,
John Johansen,
Birgir Joensen.

John er í rætta essinum

Talv: FM vinnarin frá 1998 hevur longu vunnið á Heina Olsen, sum vann FM í fjør

Heini Olsen umhugsar næsta leik móti John Rødgaard

Mynd: Talvsamband Føroya

Í Eydnuni á Oyrabakka sessaðust teir tíggju telvararnir, sum í hesum døgum stríðast um FM heitið fyri einstaklingar, við borðini klokkan tvey seinnapartin í gjár. Tá fóru teir undir triðja umfarið.

Mest spennandi talvið í gjár var tað millum John Rødgaard og Flóvin Þór Næs. John er tann av føroysku telvarunum sum hevur hægst styrkistal. Saman við Heina Olsen er styrkistalið hjá John Rødgaard 2335. Flóvin Þór Næs er tann føroyski telvarin, sum hesa síðstu tíðina hevur gjørt mest við telvingina. Ungi maðurin hevur ferðast í fleiri londum, hann hevur fleiri ferðir staðið seg væl, og tað hevur verið mett, at Flóvin, sum hevur 2235 í rating, sum tað eitur á talvmáli, fór at vera ein av favorittunum í FM kappingini fyri einstaklingar.

Flúgvandi byrjan

John Rødgaard hitti í fyrsta umfarinum ein av ungu telvarunum. Carl Eli Nolsøe Samuelsen, sum plagar at skriva um talv her í blaðnum, megnaði við hvíta fólkinum ikki at fáa nakað frá John Rødgaard.

Í øðrum umfari var Heini Olsen mótstøðumaðurin hjá John Rødgaard. Tað serliga við uppgerðini millum hesar báðar, sum hava hægst styrkistal av øllum teimum føroysku telvarunum, er, John Rødgaard vann FM í fyrra árið, og at Heini Olsen vann FM í fjør. Tá Heini Olsen vann kappingina í Klaksvík í fjør, var tað m.a. tí, at honum eydnaðist tíðliga í kappingini at vinna á John Rødgaard, sum ikki var serliga væl fyri.

Sunnudagin var eingin ivi um, hvør stóð seg betur. John Rødgaard tóktist ógvuliga uppsettur og stak væl fyrireikaður. Heini Olsen plagar altíð at vera stak væl fyrireikaður til einstøku talvini, men hesa ferð brúkti hann væl meiri tíð, enn hann plagar. Tlvið kom ikki til 30 leikir. Tá Heini hevði lagt kogin vísti klokkan hjá honum, at hann bara hevði einar fimm minuttir eftir, meðan klokkan hjá John Rødgaard boðaði frá, at hann hevði eini trý korter eftir.

Avgerandi talv

Sum sagt settust John Rødgaard og Flóvin Þór Næs við sama borð klokkan tvey í gjár. Flóvin hevði hvíta fólkið. Í gjár mettu teir í Eydnuni á Oyrabakka, at tað var rættuliga avgerandi fyri spenningin í kappingini, at tað í hvussu so er skuldi eydnast Flóvini at fáa eitt hálvt stig.

Undan talvinum í gjár hevði Flóvin hálvt annað stig. Í fyrsta talvinum vann hann á Rana Nolsøe, formanninum í Talvsambandinum, sum tekur lut í kappingini, og í øðrum umfari fekk Flóvin javnt móti Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Carl Eli bjóðaði remis.

Heini drúgvur

Heini Olsen hevur í teimum fyrstu talvunum fingið eina soltnari úrtøku, enn hann plagar at fáa. Í fyrsta umfarinum hevði hann svarta fólkið móti bygdarmanninum úr Klaksvík, Ólavi Simonsen, og ta ferðina endaði tað remis.

Sambært Arildi Rimestad, sum er formaður í føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn og sum er komi til Føroya at vera kappingarstjóri í FM kappingini, so metti Heii Olsen sjálvur, tá teir hugdu upp á talvið, at hann hevði staðið verri í tí enn Ólavur Simonsen.

– Heini plagar at vera drúgvur kappingartelvari, og eg ivist einki í, at tað er góður møguleiki fyri, at hann fer at teljast millum teir fremstu, tá kappingin verður liðug leygardagin. Í fjør var tað kostnaðarmikið hjá John Rødgaard, at hann ikki stóð seg væl í fyrstu umførunum. Hann endaði millum teir fremstu, men tað eydnaðist honum ikki at vinna. Og soleiðis er tað møguleiki fyri, at tað fer at enda hjá Heina hesa ferð, sigur kappingarstjórin, sum letur væl at kappingini.

– Tað hava ikki verið nógvir áskoðarar higartil, men tað man fara at broytast, sum tað líður út á kappingina. Eg hevði roknað við, at fleiri fara at koma skírisdag og langa fríggjadag og eisini páskaaftan, tá níggjunda og síðsta umfarið er á skránni.

Tá tað í gjár varð farið undir triðja umfarið, var tað bara ein telvari, sum framvegis var blankur á stigatalvuni. Tað var Eyðun Nolsøe, sum í fyrsta umfarinum tapti við hvíta fólkinum móti Torbirni Thomsen, og sum í øðrum umfari tapti við svarta fólkinum móti Martin Brekká.

Úrslitini í landsliðsbólkinum
1. umfar
Carl Eli Nolsøe Samuelsen–John Rødgaard 0–1
Flóvin Þór Næs–Rni Nolsøe 1–0
Herluf Hansen–Martin Brekká 1–0
Eyðun Nolsøe–Thorbjørn Thomsen 0–1
Ólavur Simonsen–Heini Olsen 1/2–1/2

2. umfar
Carl Eli Nolsøe Samuelsen–Flóvin Þór Næs 1/2–1/2
Rani Nolsøe–Herluf Hansen 1–0
Martin Brekká–Eyðun Nolsøe 1–0
Thorbjørn Thomsen–Ólavur Simonsen 0–1
John Rødgaard–Heini Olsen 1–0

Í gjár varð telvað soleiðis
Herluf Hansen–Carl Eli Nolsøe Samuelsen
Flóvin Þór Næs–John Rødgaard
Eyðun Nolsøe–Rani Nolsøe
Ólavur Simonsen–Martin Brekká
Heini Olsen–Thorbjørn Thomsen

Í fjórða umfarið, sum verður í morgin, er skráin henda
Carl Eli Nolsøe Samuelsen–Eyðun Nolsøe
Flóvin Þór Næs–Herluf Hansen
Rani Nolsøe–Ólavur Simonsen
Martin Brekká–Heini Olsen
John Rødgaard–Thorbjørn Thomsen

Nógvir fult stigatal

Í opnu kappingini ella í 1. bólki luttaka 22 telvarar. Fýra teirra vunnu tey bæði fyrstu talvini. Teir eru Martin Poulsen, Brandur Jacobsen, Reinhold Isaksen og Jákup F. Joensen.

Í unglingadeildini eru 14 luttakarar. Fýra teirra vunnu tey bæði fyrstu talvini. Teir eru Runi Dragaberg, Marl M. S. Jensen, Thomas H. Rubeksen og Mannbjørn Anthoniussen. Unglingarnir telva átta umfør.

Tá vit frættu í gjár vóru teir ikki farnir undir kappingina millum veteranar. Í tí kappingini eru tólv luttakarar, og kappingin fevnir um seks umfør. Teir tólv veteranarnir, sum hava boðað frá luttøku, eru Niclas Joensen, Jeffri Justinussen, Han J. Johannesen, Justinus Hansen, Gutti Petersen, Magni Thomassen, Niels Durhuus, Mikkjal Joensen, Hans Petersen, Jákup Thomsen, Árni M. Dam og Jóan P. Kristiansen.

Heimsins eygu vend móti Oyrarbakka

Talv: Allur talvheimurin kann fylgja við í FM-kappingini, sum í hesum døgum fer fram á Oyrarbakka

Sveinur Tróndarson

Eins og siður er, verður telvað um FM á páskum og í so máta er 2000 einki undantak.

Tað er tað kortini í aðrar mátar, tí í ár hevur allur talvheimurin møguleika - um internetið - at fylgja við í hvat fyriferst á Oyrarbakka. Talvsamband Føroya hevur nevniliga fingið samstarv við fleiri stórar talvheimasíður.

Talvsambandið hevur í longri tíð havt samstarv við www.dsu.dk, sum er heimasíðan hjá danska talvsambandinum, men nú hevur TSF eisini fingið samstarv við svenska talvsambandið. Tað merkir, at tað er ein leið frá svensku talvheimasíðuni, til tað føroysku, so til ber hjá svium at fylgja við í Føroyum.

Tað, sum kortini er meira forkunnugt er, at ein av teimum stóru talvheimasíðunum - www.chesscenter.com - hevur víst føroyingum ans. Í tí partinum, sum eitur This Week in Chess, er løgd ein leið til tann enska partin av føroysku talvheimasíðuni, og har hava útlendingar møguleika at fylgja við í tí, sum fyriferst á Oyrarbakka.

Tí kunnu vit av sonnum siga, at øll heimsins eygu eru vend móti Oyrarbakka ...

Annars hevur føroyska talvheimasíðan hesa adressu: www.sam-teld.fo/talv/